



*Archibald Black*



*Fleiri enn 700 fólk vóru á borgarafundi*



*Albert Isfeld, Gunnar Nolsøe, Archibald Black og Gunvá við Keldu høvdu orðið*

skal verða ein pavillion. Harvið verða báðar síðurnar av Klaksvík knýttar tættari saman.

Ein partur av stóru útfyllingini á Sandinum skal takast burtur, og tilfarið leggjast út eftir vestara armi. Har verður so møguleiki at byggi handilsbygningar, íbúðir, hotell, skúlar og annað.

## Hvar skal grindin?

Eftir framløguna kundu fólk gera viðmerkingar ella spyrja spurningar um ætlanina, og tað vóru fleiri, sum høvdu orðið. Øll vóru positiv um ætlanina, men onkrir spurningar vóru.

Millum annað vildi onkur vita, hvar klaksvíkingar skulu drepa grind eftir allar útbyggingarnar á vágni. Svarið var, at nýggja ætlanin fór ikki at broyta munandi um møguleikarnar at drepa grind, tí teir møguleikar eru so avmarkaðir frammanundan.

Ein áhoyrari spurdi, um børn vóru hugsað inn í miðbýarætlanina, og tað hildu stigtakarar, at tey vórðu. Fleiri av umhvørvinum í nýggju ætlanini vóru nevniliga gjørd við familjuni í huga.

Ein annar áhoyrari helt, at nú skuldi Klaksvíkar kommuna royna at staðfesta, hvør tørvur er í Klaksvík, og at gera eina ætlan út frá tí. Hetta arbeiðið er longu farið í gongd, svaraði Gunvá við Keldu, sum er borgarstjóri í Klaksvík.

Arkitekturin Albert Isfeld var eisini til staðar á fundinum. Hann hugleiddi um miðbý og arkitektur, og honum dámdi sera væl nýggju ætlanina í Klaksvík, sum hann helt verða eitt eindømi í Føroyum. Hann rósti Gunnari Nolsøe og Archiblad Black fyri at hava tikið stig til hesa ætlan.

- Tað kann verða ein fyrimunur, at glaðir amatørar hava gjørt hesa ætlan og ikki nakrir súrir professionellir, segði Albert Isfeld.

Fram til 25. apríl hava klaksvíkingar møguleikan at gera viðmerkingar til miðbýarætlanina, og eftir tað verður so politisk viðgerð av ætlanini.